TING-HELLAN

Føroyar, fosturtøka og fundamentalisma

Líkamikið hvat man annars heldur um fostur-tøku-málið, so tykist eyðsýnt, at tað er eitt mark fyri hvussu "løgnir" og "fundamental-istiskir" føroyingar kunnu loyva sær at vera um vit vilja vera tikin fyri fult í alheims samfelagnum, skrivar Sámal Matras Kristiansen í Tinghellukronikkinum í dag

FRÍGGJADAGS-KRONIKKIN
Sámal Matras Kristiansen

Í kjalarvørrinum av dúgliga kjakinum um rættin til fría fosturtøku á Føroya landi hevur ein annar, kanska enn meiri áhugaverdur og prinsipiellur spurningur stungið seg upp. At kjakið fyri og ímóti fosturtøku skuldi gerast so mikið eldfimt, er jú ikki minst fyri at takka, at m.a. danski politikarin, SF'arin Kamal Qureshi saman við "Kvindeligt Selskab" vóru farin undir eina innsavning at bøta um støðuna hjá teimum føroysku kvinnunum, ið ynskja fosturtøku, men av ymiskum orsøkum ikki hava møguleikan til tess.

Hetta hevur vakt øði í nógvum føroyingum. Vanliga fatanin er, at danir (ella útlendingar?) ikki eiga at blanda seg í hvussu vit hóreiggja okkum her á klettunum. Í Føroyum skulu føroyingar ráða fyri borgum, eisini hóast vit í stóran mun bert eru "føroysk uttaná, men danir innaní", sum Pipar og Salt einaferð kvóðu so beinrakið. Eg vil loyva mær at tríva í nakrar av grundgevingunum móti danskari (útlendskari?) innblandan.

- At danskir politikarar gjøgnum felagsskapir leggja seg út í okkara viðurskifti er óhugnaligt! Hvat verður tað næsta, sum onkur tilvildarligur útlendskur politikari fer at leggja seg út í? (Rúna Sivertsen í Sosialinum 23.okt.)

- At danskir fólkatingslimir nú koma her og bjóða sær til at forkoma okkum í fosturlívi, er ein so stór provokatión ímóti Føroya fólki, sum vii ikki undir nøkrum umstøðum kunnu góðtaka. Okkara mentanarliga, sosialt og etiskt skulu vit hava loyvi at seta sjálv. (Katrin Dahl í Dimmu 22.okt.)

Tað m.a. hesi føroysku konufólk tykjast vilja siga, er at tað bæði er "óhugnaligt", ja "ein provokatión", at útlendingar (danir?) royna at siga okkum hvar skápið skal standa. Hugburðurin tykist vera, at vit í Føroyum helst munnu vita einabest hvussu vit skullu innrætta okkara egna samfelag. Hetta er sjálvsagt einki tápuligt argument, ið einans botnar í fremmandahatri og nalvaskoðan, sum summi kanska hava lyndi til síggja tað sum. At vilja ræða sær sjálvum er eitt aldarlangt fyribrigdi, ið helst liggur djúpri í føroyinginum enn flest okkara munnu gera sær far um. At vilja ræða sær sjálvum skal í mestum brøgdum síggjast sum ein avbera styrki, ið fær fólk at velja aðrar leiðir enn bara "at fylgja við streyminum". Tað, ið skrivað verður í hesi grein stendur tískil als ikki í andsøgn við hugburðin um sjálvræði og sjálvsábyrgd, hóast summi kanska munnu tulka tað so. Katrin Dahl (Dimmalætting, 22.okt.) slær í grundini høvdið á seymin, tá hon viðger eymt punkt.

"Hevði mamma mín havt tann hugburð, um ger frammi í dag, um fría fosturtøku, og hevði tað verið frí fosturtøka, tá mamma mín átti síni børn, var eg ivaleys ongantíð komin í verðina, sum nummar fimm barn í seks ár. Heldur ikki mínum trimum yngru systrum hevði verið lív lagað, og kanska onkur av teimum eldru eisini var skolaður út. Ein óhugnaligur tamki, haldi eg sjálv. Øll mín familja hevði ikki verið til. / Um vit høvdu havt fría fosturtøku, og hugburðurin hjá kvinnum hesi seinastu 100 árini var, at nógv børn eru ein trupulleiki, so vóru vit spard fyri at halda lív í smáplássunum. Har hevði alt lív langt síðan verið útdeytt av sær sjálvum."

At eiga børn kann jú í stóran mun eisini vera ein háttur at tryggja góð livikor á smáplásum - og tað er kanska tí at fosturtøka er meiri útbreiddi býum enn á bygd; og meiri útbreidd í Danmørk enn í Føroyum.

Føroyski politiski dunnuhylurin

At tað hinvegin skal vera "óhugnaligt" ella enntá "ein provokatión" við útlendsku innblandingini, er hinvegin at fara ov langt í hesum máli. At tað skal vera galið, at onnur koma við sínum meiningum um hvat hendir í serføroyska dunnuhylinum, er ringt at síggja. Hetta merkir sjálvandi, at ruðuleiki verður millum gvaggandi politikkararnar, ið flest allir royna eftir næsta turra fransbreyðsbitanum, ið verður kastaður. At Kamal Qureshi blakar ein stein í hylin sum onkur óskikkiligur smádrongur, meðan dunnurnar vænta sær góðbitar frá "vøksnum", donskum blokkstuðulsmenniskum úr eini aðrari verð, er sjálvandi mikið strævið fyri føroysku dunnupolitikararnar, ið sum vera man flagsa runt í ørviti og gvagga upp í nevið á hvørjum øðrum. Soleiðis gongur kjakið í føroyska dunnuhylinum. Gvaggan um breyðmolar er tað, ið umræður. Hendur ein verulig ólukka, ja tá er betri at flýggja avstað og krógva seg handan greinarnar til vandin er hasaður av.

Ja, hví skulu útlendingar blanda seg í føroysk viðurskifti? Hví kunnu vit ikki sleppa at hava okkara hugnaliga dunnuhyl í frið? Spurningurin skal kanska svarast við at venda øllum kjakinum. Hví halda føroyingar seg hava rætt at hava sínar meiningar um hvat hendir í londunum kring um okkum? Hví eru føroyingar nóg góðir til at brýggja seg um støðuna í USA, Danmørk, Ísrael, Irak o.s.fr., meðan øll onnur fólk í heiminum ikki eru nóg góð at brýggja seg um støðuna í Føroyum? Hví er tað óhugnaligt og skaðiligt, tá onnur harta okkum fyri okkarar skeivleikar, meðan vit glaðiliga senda misjónerar til lond kring heimin at umvenda vantrúgv til kristindóm?

Dupultmoralurin í føroyska dunnuhylinum angar av lættflótandi fransbreyðsskvøtti. Føroyingar (og jødar og republikanskir amerikanarar?) eru Guðs egið fólk. Føroyar eru eitt lítið paradís, ið er stýrt av Guðs vilja og vælvild, og her man einki ganga galið, so leingi sum "óhugnalig" árin uttaneftir ikki ávirka okkum og skaða várt land.

Føroyar - eitt Norðuratlants Afghanistan?

Tað sama hugsaðu nakrir skeggjutir menn uppi í høgu fjøllunum í Afghanistan fyri nøkrum árum síðani. Í einum fjarum fjallalandi, ið eingin hevði sýnt áhuga, síðani sovjettisku innrásina í 80'unum, høvdu fundamentalistiskir muslimar - talibanar nevndir - bygt upp eitt reinleikans samfelag. Í hesum sam-felagi varð alt stýrt av Guðs orði. Tónleikur var bannaður, aldargamlar Buddhastandmyndir vóru sprongdar til nevagrús eftir fáum sekundum og konufólk skuldi ganga í stásiliga Bhurka-plagginum, fyri ikki at eggja fremmandum mannfólki at gera seg inn á tey. Reinleiki var eftirstrembaður, og reinleiki var funnin - høgt upp í hesum fjarskotna talibanríki.

Endin varð tó - sum kunnugt - at hesir skeggjutu menninir vórðu niðurbardir við hermegi, og kvinnurnar frelstar úr trælahafti teirra. Hesin eftirstrembaði reinleikin var vorðin so fanatiskur, at hann í vesturheims eygum var at meta sum "óndska". Tað, ið skeggjutu talibanarnir hildu vera reinleika og vakurleika, var í veruleikanum óndska, undirkúgan og fanatisma - sæð úr eygum Vesturheimsins. Hetta var úrslitið av, at eitt land í nærum tvey áratiggju hevði verið uttan fyri alheimssamfelagið og tess (eftir mínari fatan) sunna kritikki.

Í okkara egna norðuratlantiska "Talibanistan" eru føroyingar, ið hava líknandi fatanir av heiminum. Okkara glæstrimynd av reinleika og vakurleika skal ikki órógvast av kritikki uttaneftir. Til alla lukku eru Føroyar als ikki gloymdar í útheiminum. Føroyar eru ein partur av Evropa, og øll okkara grannalond hava ein ávísan áhuga í tí, ið hendir á klettunum. Tað er einki annað enn sunt fyri eitt lítið land sum Føroyar, at fólk soc.) fødu eina lesarabrævsherferð móti grógvandi fundamentalismuni í Føroyum. Men hóast tær eru dekan ov einsporaðar í teirra kritikki av føroyskum viðurskiftum, so meti eg at tær róra við nakrar sera áhugaverdar trupulleikar við føroyska almenninginum.

Í fyrstu syftu skriva tær, at *"[tað er] talan um eina álvarsliga misskiljing, tá man frá føroyskari síðu viðger rættindi kvinnanna sum eitt innanhýsis mál, ið einans hevur við føroyska fólkið at gera. Rættindi kvinnanna er fyrst og fremst eitt mál, ið tekur støði í altjóða samtyktunum, ið Føroyar og Danmørk hava gingið við til. Tískil snýr tað seg ikki um, at danski staturin ógildar Føroya innanhýsis sjálvræði, men hinvegin um, at Føroyar […] eisini mugu vænta, at tað verða sett teimum krøv uttaneftir. Opna fólkarættindi ger tað júst møguligt hjá [samfelags]bólkum at staðfesta teirra rættindi tvørtur um landamørk."* (týtt úr danskum)

Trupulleikin ið nomið verður við, er at føroyingar í einum alheimssamfelagi ikki kunnu vænta at sleppa at hóreiggja sær sum teir vilja. Føroyingar eru ei longur einans føroyingar. Og føroyingar eru heldur ikki einans danskir statsborgarar í Føroyum. Nei, føroyingar eru alheimsborgarar - kosmopolittar - um okkum líkar tað ella ikki. Vesturheimurin setir øllum vesturlendskum tjóðum krøv um opinleika, og tey, ið ikki lúka hesi krøv verða skýrd sum "ikki rættsiktaði" ella "fundamentalistar". Hvussu galið tað kann ganga, tá ið "føroyska vørumerkið" kemur í ilt ljós, sýna Karen H. Lennert og Annika Smith í endanum á sama lesarabrævi:

"Vit geva Høgna Hoydal rætt, tá ið hann ferð eftir ferð vísir á, at ríkisfelagsskapurin er við til at fáa føroyingar at renna undan ábyrgd. Í hesum samanhangi er sostatt talan um at renna undan ábyrgdini í mun til rættindini hjá føroyska borgaranum. Hetta kjakið [um fosturtøku, red.] kundi tískil verið nýtt til at hugsa um hvat image man ynskir at vísa á í framtíðini [./.] Spurningur hevur verið reistur av bæði Nased Khader og Kamal Qureshi í Danmørk. Tað er jú hugkveikjandi, at javnstøðuspurningurin kemur frá dønum, ið ikki eru uppvaksnir við siðbundnu rørslurættindi mótvegis djúpu moralsku tvídrátt-unum í ríkisfelagsskapinum. Tað ger teir kanska meiri klárýndar hvat viðvíkur dupultmoralin í danska samfelagnum, tá man einumegin fordømir religiøsar fundamentalistar í útlondum, meðan man samstundis velur at halda, at tílíkt ikki er at finna innanvert ríkisfelagsskapin, í hesum føri í Føroyum". (týtt úr danskum)

Líkamikið hvat man annars heldur um fostur-tøku-málið, so tykist eyðsýnt, at tað er eitt mark fyri hvussu "løgnir" og "fundamentalistiskir" føroyingar kunnu loyva sær at vera um vit vilja vera tikin fyri fult í alheims samfelagnum. Hinvegin eiga føroyingar at vera ernir av, at útlendingar tíma at brýggja seg um hvat hendir heima á Klettunum. Føroyingar hava í allar tíðir dugað at tikið nýggjar siðir til sín og samantvinna teir við gamla føroyska siðvenju. Sjálvandi er langt frá alt rætt, ið kemur uttan úr heimi. Men bara at krúpa inn í sína tryggu gágguskel og bíða eftir at "vandin" er av, tað er helst bara við til at gera ímyndina av Føroyum enn verri í útlondum.

Hans Pauli ikki undir sjóneyku á hesum sinni

Landsstýrismálanevndin er biðin um at kanna embætisførsluna hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, men tað fer nevndin neyvan at gera

FRÍTÍÐARSKÚLIN Á TVØROYRI
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Landsstýrismálanevndin fer neyvan at kanna embætisførsluna hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum.

Á løgtingsfundi mikudagin, heitti Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, annars á landsstýrismannanevndina um at leggja embætisførsluna hjá Hans Paula Strøm undir sjóneykuna.

Løgtingið hevði málið um leiðaran á frítíðar-skúlanum á Tvøroyri til viðgerðar. Annita á Fríðriksmørk hevði sett landsstýrismanninum nakrar atfinningarsamar spurningingar um hansara leiklut, tá ið kommunan setti ein lærara í starvið sum fyribils leiðara á frítíðarskúlanum til setti leiðarin kemur aftur úr farloyvi í summar.

Og atfinningarnar frá andstøðuni regnaði niðuryvir landsstýrismannin í hesum sambandi.

Eitt nú varð hann skuldsettur fyri at seta rættartrygdina hjá einum borgara til viks, hann var skuldsettur fyri at renna ørindi fyri javnaðarflokkin á Tvøroyri og hann varð skuldsettur fyri at hava góðtikið, at kommunan brúkti beinleiðis ósakligar grundgevingar til at vrakað einasta skikkaða umsøkjaran til leiðarastarvið.

Tað stendur í lógini, at leiðarar á frítíðarskúlum skulu vera námsfroðingar, altso pedagogar.

Hans Pauli Strøm vísti á, at pedagogurin hevði at enda fingið grundgevingar fyri, hví hon ikki fekk starvið og tær grundgevingarnar hevði hann góðtikið.

Og tað endaði við, at Páll á Reynatúgvu heitti á formannin í landsstýrismálanevndini um at taka málið upp og at kann embætisførsluna hjá Hans Paula Strøm í hesum máli.

Tekur neyvan málið upp

Kári P. Højgaard er formaður í Landsstýris-málanevndini og hann sigur, at tað er ikki avgjørt, um landsstýrismálanevndin fer at taka málið upp.

Hann fer nú at taka spurningin upp við hinar báðar limirnar í nevndini, sum eru Karsten Hansen, ið er næstformaður, og Kjartan Joensen.

Men sjálvur heldur hann ikki, at hetta er eitt mál fyri landsstýrismálanevndina.

Hann vísir á, at Pedagogfelagið hevur lagt málið fyri Løgtingsins Umboðsmann og hann heldur ikki at tað er rætt, at tveir eftirlitsstovnar hjá tí almenna skulu viðgera sama mál ísenn.

– Tá ið Løgtingsins Umboðsmaður viðgerð málið, vildi tað verið ógvuliga óheppið, at Landsstýrismálanevndin eisini tekur málið upp, sigur Kári P. Højgaard.

– Tað ber ikki til, at tveir eftirlitsstovnar viðgera málið samstundis.

Hann metir sostatt, at landsstýrismálanevndin fer í hvussu so er ikki at taka málið upp, fyrenn Løgtingsins Umboðsmaður er komin við sínari niðurstøðu.

Men kemur Umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at embætisforslan hjá landsstýrismanninum er atfinningarsom, kann tað hugsast at vera eitt mál fyri landsstýrismálanevndina

– Tað kann eisini vera, at umboðsmaðurin kemur til ta niðurstøðuni, at hetta er júst eitt mál fyri Landsstýrismálanevndina. Les meir aðrastaðni í blaðnum.

Kári Post fer nú at tosa við restina av landsstýrismálanevndini um teir skulu taka embætisførsluna hjá Hans Paula Strøm. Men sjálvur heldur hann ikki

Úrvalsbrúkari innan roknskap og EDV

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Í Gjaldstovuni arbeiða uml. 30 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle Financials. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar: Felags lønarskipan, Búskettskipan, Leiðslukunningarskipan og Dátuvørurhús.

- Figgjardeildin hevur ábyrgdina at ráðgeva um Búskaparskipan Landsins t.d. í høvuðsbóka-, debitora-, kreditora- og øðrum skipanum.
- Deildin luttekur, tá ið nýggjar skipanir verða kravfestar og tiknar í nýtslu. Deildin er eisini við í landsroknskapar- og figgjarlógararbeiðinum. Hon skal somuleiðis vera við til at menna figgjarstýringina hjá tí almenna og at røkja Búskettskipanina, Leiðslukunningarskipanina og heimasíðuna hjá Gjaldstovuni.
- Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað.

Gjaldstovan hevur eina flekstíðarskipan, og í Figgjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

Meira um hetta er at lesa á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

Í løtuni nýta o. u. 800 brúkarar Búskaparskipan landsins.

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**

Nú eitt av okkara dugnaligu starvsfólkum hevur valt at fara undir hægri útbúgving, er eitt starv sum úrvalsbrúkari í Figgjardeildini á Gjaldstovuni leyst at søkja. Ert tú tann rætta/rætti, kunnu vit bjóða tær eitt spennandi starv innan roknskap og EDV.

Ábyrgdarøkið verður at ráðgeva og undirvísa í skipanum undir BSL, gera vegleiðingar og mannagongdir, gera úrrit og annars at skapa kunning við dátum í EDV-skipanum, røkja og menna heimasíðuna og vera við, tá ið nýggj tøkni og skipanir skulu verða tiknar í nýtslu.

Tann, sum verður sett/ur, skal hava útbúgving innan roknskap og/ella EDV sum t.d. HH, HA, datanom, datamatikara v.m., hava góðan kunnleika til bókhald, roknskap og til bókhaldskipanir, duga at skriva føroyskt og kenna vanligar skrivstovuskipanir sum outlook, word og excel. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir innan roknskaparøkið og EDV. Men tey, ið júst hava lokið eina útbúgving, kunnu eisini søkja.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið verður sett/ur, kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð evni at samskifta við onnur, t.d. tá ið undirvíst verður í skipanum.

Í byrjanartíðini verður upplæring um tær neyðugu skipanirnar.

Lønar- og setanarviðurskifti eru samb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Figgjarmálaráðið alt eftir útbúgving og royndum. Arbeiðstíðin verður 39 tímar um vikuna.

Umsókn við skjølum og CV skulu verða **Føroya Gjaldstovu, Boks 2009, 165 Argjum** í hendi innan 8. november 2004.

Hans Petur Joensen tlf. 352455, sum er deildarleiðari, er fúsur at svara spurningum starvinum viðvíkjandi.

Dimmalætting